# Steven Spielberg presenterar: Taken




**Fakta**

**CANAL+**

**Týskvøldið kl. 19.00**

Steven Spielberg presenterar: Taken 1 - Beyond The Skies

Í 10 films-pørtum fylgja vit trimum familjum - frá Roswell-tilburðinum í 40´unum til í dag. Her síggja vit, hvussu lív teirra verður ávirkað av sambandi við rúmdarverum og, hvussu stjórnin roynir at myrkaleggja tilburðirnar. Fyrsti parturin er leikstjórnaður av Tobe Hooper („The Texas Chainsaw Massacre“, „Poltergeist“) - nærsamband av eini aðrari verð...

**Komandi 10 týskvøldini kl. 19.00 á canal+ og fríggjakvøld kl. 20.00 á Canal+ Gul**







**Fakta**

**Roswell-tilburðurin:**

8. juli 1947 kunngjørdi Amerikanska flogvápnið at eitt fremmant rúmdarfar var duttið niður í oyðimørkini í statinum Ný Meksiko tætt við býin Roswell. Tíðindini flugu kring allan heimin. Dagin eftir varð kunngerðin tikin aftur, sagt varð at talan í staðin var um nakrar japanskar veðurmátingar-ballónir. Men málið varð tó langt frá at vera avgreitt. Fleiri vilja vera við at myndugleikarnir royndu at myrkaleggja málið.



Í næstseinastu viku varð sagt, at mann hevði funnið prógv fyri at lív er á Reyðu Gongustjørnuni. Hetta er í roynd og veru ein søgulig hending, ið hevur sínar avgjørdu fylgjur fyri mannahugsan og máta at uppfata seg sjálva. Hesin spurningurin, um tað finst lív ella ikki aðrastaðni enn her á Jørðini, hevur upptikið menniskju serliga síðan 50´ini, tá „science fiction“ sjangran var í hæddini. Tá var talan serliga um grønar lítlar mars-menn.

Meðan teir báðir mars-bilarnir - Spirit og Opportunity - taka myndir og mátingar av Mars og senda niður á Jørðina, so sendir Canal+ „Taken” - ein røð í 10 pørtum, ið snýr seg um menniskjur, sum koma í nærsamband við rúmdarverur.

Týsdagin 3. februar byrjar Taken-røðin á Canal+. Heimskendi produsarin, Steven Spielberg, hevur framleitt hesa Emmy-virðisløntu røðina, ið fylgir trimum familjum yvir trý ættarlið. Familjurnar koma í nærsamband við rúmdarverur - lív teirra og eftirkomarar verða merktir fyri lívi. Frásøgan verður søgd av 10 ára gomlu Allie Keys (Dakota Fanning), ið er abbadóttir ein amerikanskan flogskipara, ið varð tikin í týskum luftrúmi av rúmdarverum.

**Søgan - Taken**

Byrjað verður undir 2. Veraldarbardaga yvir Týsklandi. Russell Keys er illa skaddur meðan krígsflogfar hansara er á veg niðureftir. Brádliga verður flogfarið umringað av einum bláum ljósi. Nakað eftir hetta, koma hann og mannskap hansara til sín sjálvs í øllum góðum niðri á tryggari jørð við ongum minni um bláa ljósið, ella um, hvussu teir vóru endaðir har. Men Russell fær frænir av, at lív hansara er álvarsliga broytt, tí ein og ein av mannskapinum úr flogfarinum doyggja undir ógreiðum umstøðum. Hjálparleysur leitar hann í sínum stongda minni, ið spakuliga letur seg upp og vísir honum hvat, ið veruliga fór fram. Eisini gerst hann greiður yvir, at hansara komandi ættarlið, eisini verða burturflutt av rúmdarverum.

**Roswell-tilburðurin**

Hetta er ein av trimum søgum um familjur, ið vera merktar av inntrivi úr rúmdini. Sett í eini veruligari og søguligari rammu, er Taken ein kraftmikil kensluborin frásøgn um møtið millum mann og rúmdarverur. Tann tiltikni Roswell-tilburðurin í Ný Meksiko í 1947, ið varð nógv umtalaður av amerikansku pressuni, er tikin við í røðina.

**Steven Spielberg**

Steven Spielberg erstóra stjørnunavnið í røðini. Í nøkrum av partunum sæst hansara arbeiði rættiliga týðuliga. Fyrr hevur hann arbeitt við filmum, sum hava við rúmdina at gera, nevnast kunnu „Close Encounters of the Third Kind” frá 1977 og „E.T.”. Í viðtalu við amerikansku sjónvarpsrásina Sci Fi, sigur Spielberg: „Tað, ið altíð fangar meg við Sci-Fi-sjangruni er, at hon fríar hugflogið, so at mann kann fara til øll møgulig støð. Har eru onkar avmerkingar og fyri meg, persónliga, er hetta tann mest frígerandi sjangran at arbeiða við.“